# um hvurvu

**u, nú føroyingar hava mist síni føstu pláss á Danmarks Journalisthøjskole, og
nissin, meðan onnur halda hetta vera skumpið, ið noyðir okkum at seta okkara
ørjar avleiðingar hetta fær fyri føroysku fjølmiðlarnar og fólkaræðið**




ikki hevur sent broytingina til hoyringar, sum vanlig mannagongd annars áleggur. Sosialurin setti seg í samband við danska Undirvísingarmálaráðið, men har søgdu tey seg ikki kennast við broytingina, men lovaðu at kanna málið og geva okkum grundgevingarnar seinni í vikuni.

Útbúnu journalistarnir Uni Arge og Øssur Winthereig eru samdir um, at føroysk journalistútbúgving eigur at verða sett á stovn. Leiðarin á upptøkunevndini á Journalistháskúlanum, Erik Farmann, grundgevur við, at føroyingar ikki skulu hava serrættindi fram um aðrar etniskar minnilutar. Blaðstjórarnir á ávikavist Sosialinum og Dimmalætting, Jan Müller og Ingi Samuelsen, harmast báðir um avgerðina, men stuðla lutvíst hugskotinum um føroyska journalistútbúgving. Í blaðnum í morgin prenta vit samrøður við báðar blaðstjórarnar.

Minni enn helmingurin av teimum, sum starvast í føroyska fjølmiðlaheiminum, hava útbúgving. Við støði í hesi niðurstøðu hyggja vit nærri at broytingini, sum avmarkar møguleikan hjá føroyingum at útbúgva seg á Danmarks Journalisthøjskole. Hvørjar eru avleiðingarnar? Hvussu fer hetta at ávirka útbúgvingarstøðið í føroyska fjølmiðlaheiminum? Merkir hetta, at ein nýggj føroysk journalistútbúgving skal setast á stovn?

Sjálvandi ber til at nema sær útbúgving aðrastaðni enn á journalistháskúlanum í Århus, og broytingin í reglugerðini er sjálvsagt ikki alfa og omega fyri møguleikan hjá føroyingum at nema sær útbúgving í journalistikki. Men hagtøl prógva, at nógv teir flestu útbúnu journalistarnir í Føroyum eru klaktir í Århus, og tí er spurningurin, hvørjar avleiðingar nýggja broytingin fær.

# Mentamálaráðharrin visti av ongum

**Sum útvarpsinnslagið á middegi leygardagin bar boð um, visti Jógvan á Lakjuni einki um broytingar í upptøkukrøvunum fyri føroyskar umsøkjarar á danska Journalistháskúlan. Men mentamálaráðharrin lovar Sosialinum, at málið verður tikið upp, bæði við danska undirvísingarmálaráðharran og við føroyskar fjølmiðlar**



FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

– Málið hevur ongantíð verið á mínum borðið. Alt bendir á, at danski undirvísingarmálaráðharrin Bertel Haarder ikki hevur kunnað meg um broytingina, og hetta er í stríð við alla vanliga mannagongd, tí ein og hvør broyting, sum viðkemur okkum, skal sendast okkum til hoyringar, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri.

Hóast danska Undirvísingarmálaráðið saman við danska Journalistháskúlanum broytti reglugerðina um upptøkukrøv fyri føroyskar umsøkjarar tann 6. mars í ár, er Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, ikki kunnaður um málið fyrrenn í seinastu viku. Tað var Høgni Djurhuus, útvarpsmaður, sum kunnaði hann um málið í innslagi á middegi leygardagin, og Jógvan á Lakjuni sigur seg taka í álvara, at tvey sjálvsøgd pláss fyri føroyingar á Journalistháskúlanum í Århus nú eru horvin. Samstundis undrast hann á, at málið ikki er sent Mentamálaráðnum til hoyringar, soleiðis sum vanlig mannagongd áleggur.

– Eg vil fegin viðurkenna, at tað er ov vánaligt, at eg ikki eri kunnaður um eina broyting, sum kann fáa avleiðingar fyri føroyska fjølmiðlaheimin. Men danska Undirvísingarmálaráðið hevur eftir øllum at døma ikki boða nøkrum frá, tá teir broyttu kunngerðina. Hetta er ein akuttur trupulleiki, sum eg fari at taka upp í nærmastu framtíð, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri.

### Kringvarpslógin

Fyrst ynskir hann at viðgera málið saman við egnari umsiting. Síðani fer hann at taka málið upp við danska undirvísingarmálaráðharran Bertel Haarder, tá hesir hittast um tvær vikur í sambandi við yvirtøku av føroysku fólkakirkjuni. Og í triðja lagi fer hann at kalla føroyskar redaktørar saman til fundar í Mentamálaráðnum.

- Eg eri egg positivt sinnaður at seta á stovn føroyska journalistútbúgving. Beint undan summarsteðginum skoytti løgtingið uppí kringvarpslógina, at redaktørar hava skyldu til at syrgja fyri einum høgum fakligum støði. Ein slík samtykt áleggur okkum at liva upp til hesa orðing, sigur Jógvan á Lakjuni.

# Undan danska skjúrtavelinum

**– Vit mugu koma burtur frá tí, at tað týdningarmiklasta er at stava rætt. Sjálvandi skulu skulu vit stava rætt, men journalistikkur er ikki bara at duga at stava rætt føroyskt, sigur Øssur Winthereig, ið heldur at tað er týdningarmikið, at fáa royndir uttanlands, men at vit ikki kunna dúva upp á, at gera journalistútbúgvingarnar fyri okkum**

FJØLMIÐLAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

– Vit loysa ikki trupulleikan við at hanga í skjúrtavelinum hjá danska undirvísingarmálaráðnum.

Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í Sjónvarpinum er avgjørdur, tá vit spyrja hann, hvat hann metir um støðuna, nú føroyingar hava mist sína kvotu á Danmarks Journalisthøjskole.

Hann heldur tað vera "sjáldsamt", sum hann kallar tað, at landsstýrismaðurin Jógvan á Lakjuni ikki visti av, at føroyingar ikki longur fáa tvey pláss á skúlanum.

Hinvegin setir hann spurnartekn við, um tað var rætt, at vit fingu tvey pláss til næmingar, sum møguliga høvdu ikki høvdu staðið ta donsku royndina, hóast spurningarnir ofta snúgva seg um donsk viðurskifti.

Øssur Winthereig metir, at sum heild gera tvey pláss ikki tann stóra munin, tí sum sum so heldur hann ikki, vit hava merkt, at vit hava átt hasi bæði plássini, av tí at tað meira enn so er komið fyri, at fólk ikki eru komin heimaftur.

Hann heldur tí tað vera eitt gott hugskot, at byrja eina føroyska journalistútbúgving, men hann sigur tað vera neyðugt, at samstarvað verður við lærustovnar t.d. universitet í Danmark ella aðrastaðni.

– Annars kann tað verða ov heimføðisligt, sigur Øssur Winthereig og leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at fólk fáa roynt seg á miðlum uttanlands í lestrartíðini.

– Vit mugu koma burtur frá tí, at tað týdningarmiklasta er at stava rætt. Sjálvandi skulu vit stava rætt, men journalistikkur er ikki bara at duga at stava rætt føroyskt, sigur tíðindaleiðarin.

### Føroysk viðurskifti

Hann metir nakrar av orsøkunum til, at fleiri journalistlærdir føroyingar ikki koma heim aftur vera, m.a. at lønin er hægri og avbjóðingarnar fleiri uttanlands.

– Vit hava hava ongantíð rættiliga satsað upp á journalistikkin í Føroyum, sigur Øssur Winthereig og finst serliga at bløðunum, sum hann kallar vanligar privatar fyritøkur, ið heldur hugsa um business enn um kritiskan journalistikk, sum hann tekur til. Hann heldur, at um lønin hevði verið hægri, hevði verið lættari hjá teimum at fingið útbúnar journalistar at arbeitt á bløðunum.

– Innsatsurin má nú koma frá Mentamálaráðnum ella t.d. Blaðmannafelagnum, sigur Øssur Winthereig um eina føroyska útbúgving, og leggur afturat, at tað á ymiskum økjum t.d. í lógini um alment innlit og innan fiskivinnuna, eru viðurskiftini øðrvísi í Føroyum enn í t.d. Danmark, og tí hevði verið gott at fingið hetta við í eina føroyska útbúgving.

### Hinmegin borðið



Spurdur, hvat hann heldur um, at tað gerst alt vanligari at síggja útbúnar journalistar starvast í peningastovnum og almennum skrivstovum, sigur Øssur Winthereig, at tað er ikki so galið.

– Tey eru farin "hinumegin borðið", men tey gera journalistikk, staðfestir tíðindaleiðarin, ið heldur, at royndir teirra kunnu koma teimum, arbeiðsgevarum teirra og fjølmiðlunum til góðar, av tí at at teirra leiklutur er at kunna.

Men er hetta ikki eitt slag av spin-doktarum?

- Nei, vit, sum eru eftir, duga betur, enn teir sum ansa eftir pengunum, sigur Øssur Winthereig.

Setur hetta ikki størri krøv til tykkum sum pressa?

- Um tey hava verið í bransjuni fyrr, so er tað lættari hjá okkum, sigur tíðindaleiðarin, ið m.a. nevnir dømi um, at tílík kunningarfólk kunnu t.d. sannføra ein stjóra um, at tað er rættari at vera við eini samrøðu við fjølmiðlarnar enn at lata vera.

Hann heldur ikki, at fjølmiðlarnir verða snýttir, ella at tílík kunningarfólk gera meira spin, enn t.d. ein stjóri hevði gjørt, um hann ikki hevði útbúnar journalistar í starvi sum kunningarfólk.